*Framhald av síðu 5*

> *Skulu handverkarar á bygd til Havnar at arbeiða, verða teir tvingaðir at arbeiða hjá byggifyitøkum og handverksmeistarum í Havn. Annars sleppa teir ikki upp í part*

rætt at vit skulu spæla okkum av við møguleikarnar at arbeiða uttanlands í allar ævir fyri at geva byggifeløgum og handverksmeistarum í Havn ein løtuvinning.

Annars vísir John Eli Olsen á, at tá ið føroyingar fara uttanlands at arbeiða, er tað útflutningur og tað er útflutningi, vit altíð sóknast eftir í hesum alsamt meiri alheimsgjørda heimi.

Eisini El-Service á Skála ætlar sær í næstum til Noregs at arbeiða í oljuvinnuni.

– Men tað er ikki bara fyri at leiga handverkarar út til oljuvinnuna. Tá ið vit fara uttanlands, fara vit sum ein fyritøka og endamálið er at útvega okkum vitan um arbeiði í oljuvinnuni.

– Tað meta vit sum eina íløgu í framtíðina hjá okkara fyritøku, leggur hann afturat.

Sostatt heldur hann, at ístaðin fyri at leggja forðingar í vegin, eiga vit at royna at fáa fleiri føroyskar fyritøkur á útlendska marknaðin, tí tað er útflutningur og skapar og tað skapar inntøkur til samfelagið.

**Kappast ikki á jøvnum føti**

Annars heldur hann, at landið kundi gjørt meiri fyri at tryggja føroyskum fyritøkum arbeiði.

Tað kundi landið gjørt við at tryggja, at tað vóru føroyskar fyritøkur, sum sluppu at gera tey almennu arbeiði, sum eru í Føroyum.

Men tað ger landið ikki.

Í øðrum londum er tað ikki vanligt, at lata útlendskar fyritøkur sleppa framat stórum, almennum arbeiðum, men tað gera føroyingar.

Men hann er eisini sannførdur um, at kappingin frá teimum útlendsku feløgunum, er ikki heilt reiðilig.

– Eitt er, at tá ið útlendskar fyritøkur bjóða upp á arbeiði í Føroyum, hava tær mangan okkurt slag av ES útflutningsstuðuli í rygginum. Harafturat hava tær ymsar møguleikar at mingulera við punktgjøldunum, sum tey skulu betala av vørum, tær innflyta til Føroyar í sambandi við arbeiði, tær skulu gera í Føroyum.

– Tað kann útlendska fyritøkan gera við at skriva virðið á tilfari nógv lægri enn veruliga prísurin er. Sostatt lækkar punkgjaldið munandi.

– Hevur eitt virkið, sum bjóðar uppá eitt arbeiði í Føroyum, eisini eina fyritøku uttanlands, sum selir tilfar, ber væl til at skriva virðið á einum ljósi til 50 krónur, hóast veruligi prísurin er 500 krónur. Sostatt spara tær stórar upphæddir í punkgjøldum. Tað hava føroyskar fyritøkur ongan møguleika til.

John Eli Olsen sigur, at hann fer ikki her at leggja útlendskar fyritøkur undir at fara lætt um punktgjøldini.

– Men møguleikin er har. Í øllum førum fáa útlendsku fyritøkurnar mangan ES stuðul, sum kann vera upp í 25% og sostatt er kappingarstøðan hjá føroysku fyritøkunum sera vánalig.

Men eg haldi, at tað almenna átti at verið so mikið at sær komið, at tað varðveitti øll almenn arbeiði í Føroyum, tí tað hevði eisini kastað nógv av sær í skattum og avgjøldum, leggur John Eli Olsen afturat.

> *Tað almenna í Føroyum átti at verið so mikið at sær komið, at tað varðveitti øll almenn arbeiði í Føroyum*

# Suðuroyingar fækkast

**Fólkatalið í Suðuroy er tað lægsta síðani 1920'uni. Í november í fjør var talið komið niður á 4.962. Tá kreppan var upp á tað versta í nítiárunum var kom fólkatalið niður á 4.973 fólk, skrivar Suðurrás HYPERLINK "http://www.sudurras.fo" www.sudurras.fo**

FÓLKATAL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Sambært tølum frá Hagstovu Føroya var fólkatalið í Suðuroynni í november 2005 komið niður á 4.962 fólk, ein minking á 75 fólk í mun til við ársbyrjan 2005. Í prosentum er talan um eina minking uppá gott og væl 1,5%, sum er ein minking uppá meiri enn 1 % størri enn minkingin var í Føroyum sum heild teir fyrstu 11 mánaðirnar í fjør.

Um hugt verður yvir eitt longri tíðarskeið, so hevur fólkatalið í Suðuroynni ikki verið so lágt í nýggjari tíð. Í kreppuárunum fyrst í 1990unum minkaði fólkatalið í Suðuroynni heilt nógv – frá umleið 5.900 fólkum í 1980unum til færri enn 5.000 fólk í 1999 – og kom fólkatalið í ár 2000 niður á 4.973 fólk. Eftir hetta vaks fólkatalið aftur nakað og var fólkatalið í 2002 komið uppá 5.134 fólk.

Síðan hetta er fólkatalið støðugt minkað og er fólkatalið altso nú komið niður á 4.962 fólk – og hevur fólkatalið í Suðuroynni ikki verið so lágt síðan í 1920unum. Í 1953, tá flest fólk búðu í Suðuroynni, búðu 6.314 fólk í oynni.

# Heini sleppur kortini at stilla upp

**Limir Starvsmannafelagsins sleppa kortini at velja, um Heini Joensen skal vera formaður ella um Gunnleivur Dalsgarð skal halda fram**



FAKFELAG
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Nevndin í Starvsmannafelagnum hevur avgjørt at ógilda avgerðina um, at Heini Joensen ikki er valbærur til formansval Starvsmannafelagnsins.

Henda avgerð er tikin, eftir at ivi varð sáddur um avgerðina, sum nevndin hevði tikið um, at Heini Joensen sambært viðtøkum felagsins ikki var valbærur, tí hann var í starvi hjá Starvsmannafelagnum.

Nevndini sigur, at hon er gjørd kunnug um, at fólk í starvi hjá Starvsmannafelagnum áður hevur stillað upp og varð valt í nevnd felagsins.

Sostatt eru tvey valevni, ið stilla upp til starvið sum formaður í Starvsmannafelagnum, nevniliga Heini Joensen og Gunnleivur Dalsgarð.

# Jacob skal svara, um Jacob lurtar eftir Jacob…

**– Jacob Vestergaard hevur skotið upp at lata Smyril sigla tríggjar túrar um dagin, og Jacob Vestergaard verður nú spurdur, um hann ætlar at gera so, sum Jacob Vestergaard sjálvur hevur skotið upp, sigur Hergeir Nielsen, løgtingsmaður**

SMYRIL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Samferðslan er av avgerandi týdningi fyri menningina og búsetingarmynstrið úti um landið.

Tað sigur Hergeir Nielsen, løgtingsmaður Tjóðveldisfloksins, sum hevur skotið upp at økja túratalið hjá Smyrli upp í tríggjar túrar um dagin, og at tænastustigið varð samsvarandi fortreytunum fyri støðd, ferð og siglingstíð.

Hetta uppskot fekk bara átta atkvøður úr Tjóðveldisflokkinum og fall.

Ein meiriluti í rættarnevndini mælti løgtinginum frá at taka undir við uppskotinum.

Meirilutin staðfesti, at landsstýrismaðurin og leiðslan á Strandfaraskipum Landsins saman við avvarðandi pørtum arbeiddu við at finna eina nøktandi loysn fyri ferðafólk og vinnuna í Suðuroynni.

– Frá Jacobi Vestergaard fekk nevndin handað fyrilestur, sum Bjarni Mortensen, hevði hildið um samferðsluna og týdningin av hægri túratali um Suðuroyarfjørð. Eisini mælti sami Jacob Vestergaard vegna samferðslubólkin í Suðuroynni til, at túratalið varð økt upp í tríggjar túrar um dagin, og at hetta varð lýst beinanvegin, so nytta fekst burturúr skipinum komandi summar, sigur Hergeir Nielsen.

– Sóknast verður nú eftir hesi loysn, sum Jacob Vestergaard hevur stríðst fyri, og hvussu Jacob Vestergaard ætlar sær at nøkta tilmælið frá Jacob Vestergaard, vísir Hergeir Nielsen á.

Hann vísir eisini á, at upplýst varð um dagarnar, at fólkatalið í Vágum er økt við 4,5% síðani Vágatunnilin kom, meðan fólkatalið í Suðuroy er fallið við 1,5% um somu tíð.

Fólkatalið í Suðuroynni er nú 4.962 fólk, og er hetta tað lægsta talið í nýggjari tíð.